VÆLKOMIN Á GLASIR

# 2026



GLASIR

HAR LÆRDÓMUR FESTIR RØTUR

# Innihaldsyvirlit


| | |
|---|---|
| Vælkomin á Glasir | 2 |
| Eitt livandi umhvørvi | 3 |
| Nǽmingaráðið bjóðar tykkum vælkomin | 4 |
| Á Glasi festir lærdómur røtur | 5 |
| Vælkomin í Næmingatænastuna | 6 |
| "Góð byrjan" lærir teg um KT á Glasi | 7 |
| Stuttsøgukapping á hvørjum ári | 8 |
| Vitlíki - vinur ella fíggindi | 9 |
| Glasir hevur nógvar tænastur at bjóða | 10 |
| Nógv tiltøk á Glasi | 11 |
| Vit fara væl um skúlan | 12 |


GLASIR
TÓRSHAVN COLLEGE

# Vælkomin á Glasir

## Góðu næmingar, lærlingar og lesandi á Glasi

Eitt spennandi skúlaár stendur fyri durum. Vit hava glett okkum at taka ímóti tykkum og til tíðina saman við tykkum her á Føroya størsta útbúgvingarstovni.

Vit vóna, at tíðin á Glasi fer at vera bæði lærurík og minnisrík. Her fara tit at fáa nýggjar vinir, møta nýggjum avbjóðingum og menna tykkum bæði fakliga og persónliga.

"Á Glasi útbúgva og búgva vit tann einstaka fakliga og menniskjaliga. Vit kveikja áhuga og forvitni fyri menning og læring. Hetta er okkara avgerandi leiklutur í samfelagnum."

Soleiðis ljóðar endamálsorðingin hjá Glasi. Alt okkara virksemi snýr seg um at liva upp til hetta.

Á Glasi hava tit bestu karmarnar at útbúgva og búgva tykkum. Okkara ynski er, at tit brúka teir til fulnar og eru virkin í bæði undirvísing og øðrum tiltøkum á Glasi. Øll læring er viðkomandi, so latið sinnið upp og leggið í vaðið.

Her eru nógv dugnalig starvfólk, sum vilja hjálpa og stuðla tykkum at røkka tykkara máli.

Hjartaliga vælkomin á Glasir.


Una Joensen, rektari


Magni á Lakjuni, vararektari


Annie Fjallsá, stjóri fyri Næmingatænastuna

# Eitt livandi umhvørvi

2025-2026 var eitt ómetaliga hendingaríkt ár á Glasi. Árlig afturvendandi tiltøk sum ítróttardagur, temadagur, Vinnan vitjar, Les í Føroyum vóru á skrá. Ein nýggj siðvenja er føroyskur dansur í føstuni í januar og februar mánaði. Í byrjanini av 2026 vóru ikki minni enn tvey val í Føroyum - løgtingsvalið og fólkatingsvalið.











# Næmingaráðið bjóðar tykkum vælkomin



**Góðu komandi næmingar og lærlingar á Glasi**

Vegna næmingaráðið á Glasi vilja vit ynskja tykkum hjartaliga vælkomin. Nú byrjar ein spennandi ferð hjá tykkum. Tit koma at hitta nógv nýggj fólk. Tíðin á Glasi er ein tíð, har vit mennast og broytast. Hetta koma tit at merkja. Næmingaráðið er mannað av umboðum úr øllum árgangum og leiðum á skúlanum. Ráðið er røddin hjá tykkum næmingum og lærlingum. Vit vilja heita á tykkum øll um at brúka næmingaráðið. Vit eru sett til at taka spurningar og mál upp, sum hava við tykkum at gera. Tað ber altíð til at taka mál upp til umrøðu í næmingaráðnum. Til ber at hava ávirkan her. Vit vilja eisini minna tykkum á, at næmingaráðið er ein supergóður møguleiki hjá tykkum at mennast og læra at taka ábyrgd við at stilla upp og taka eitt tørn í ráðnum. Val er til næmingaráðið í september mánaði. Vit hava lært nógv av at sita í næmingaráðnum um samstarv, handfaring av fólki og at fáa framt ætlanir.

Bestu ynskir

Heðin Teitsson, formaður, og Juanita Gleðisheygg, næstforkvinna
Næmingaráðið á Glasi 2025/26

GLASIR
TÓRSHAVN COLLEGE

# Á Glasi festir lærdómur røtur



Norrøna fornsøgan sigur, at Glasir var ein viðarlund ella eitt træ uttanfyri Valhøll, sum var vakrast millum gudar og menn. Á Glasi stendur eisini eitt serstakt træ mitt í Atrium sum tekin um, at her festir lærdómur røtur, og at okkara næmingar og lærlingar mennast fakliga og menniskjaliga.

GLASIR
TÓRSHAVN COLLEGE

# Vælkomin í Næmingatænastuna

Í Næmingatænastuni eru lestrarvegleiðarar, orðblindalærarar, audiologopedur og bókavørðir – øll við ymiskari vitan og royndum, men vit arbeiða fyri sama endamáli: at hjálpa tær at trívast og mennast - og at gjøgnumføra útbúgvingina.

Vit vilja stuðla tær at menna fakligar førleikar og at fáa størri sjálvsálit og dirvi til at møta avbjóðingum bæði í skúlanum og í lívinum.

Saman við lærarum og øðrum starvsfólkum arbeiðir Næmingatænastan fyri, at tú fært eina góða og gevandi skúlatíð. Umframt vanliga undirvísing kanst tú fáa serfakligan stuðul og vegleiðing, um tú hevur tørv á tí.

Tað skal vera lætt og trygt at biðja um hjálp. Tú er altíð vælkomin inn á gólvið til eitt prát.

Vit gleða okkum at fylgja tær gjøgnum bæði sigrar og avbjóðingar. Saman arbeiða vit fyri, at tín útbúgvingartíð verður spennandi, mennandi og hugkveikjandi.



Næmingatænastan brúkar kumpassið sum mynd.
Helena Norðoy Poulsen úr 25z gjørdi tekningina.



# "Góð byrjan" lærir teg um KT á Glasi

Nógv nýtt er at læra og venja seg við fyrstu tíðina sum nýggjur næmingur á Glasi.

Serliga kann tað tykjast fløkt við øllum KT-skipanum og KT-mannagongdum, sum vit brúka á Glasi. Men stúr ikki! Vit eru altíð til reiðar at hjálpa og vegleiða.

Fyri at hjálpa tær væl í gongd við KT, hava vit gjørt eina síðu, sum vit kalla "Góð byrjan". Her fært tú hjálp og vegleiðing til nakrar av mest vanligu avbjóðingunum innan KT í skúlahøpi á Glasi. "Góð byrjan" verður brúkt sum innleiðsla til skúla-KT teir fyrstu dagarnar av skúlaárinum, men síðan er eisini hent at brúka gjøgnum alla skúlagongdina fyri at minna teg á, hvussu tú brúkar hesar KT-skipanir.

Leinkið til "Góð byrjan" heimasíðuna er: glasir.fo/godbyrjan.

Á heimasíðuni glasir.fo/kt eru eisini vegleiðingar og leinki til at heinta KT-amboð og skipanir.






# Stuttsøgukapping á hvørjum ári

Dámar tær at skriva, og hevur tú kanska ein rithøvund í búkinum? So er stuttsøgukappingin á Glasi, sum skúlin skipar fyri á hvørjum ári, ein góður møguleiki at royna hesi evni.

Tríggjar tær bestu søgurnar fáa eina peningavirðisløn. Ein dómsnevnd, sum er mannað við lærarum og rithøvundum, velur vinnandi søgurnar.

Kunning verður send út um kappingina á heysti við freistum og mannagongd fyri at lata inn.



## VINNARASØGURNAR Í ÁR



Pauli Sigurðsson úr 23n átti bestu stuttsøguna, meðan Bára Eliasen úr 24b átti næstbestu og triðbestu stuttsøguna í farna skúlaári. 65 uppskot komu inn. Les vinnandi stuttsøgurnar her:

# Vitlíki - vinur ella fíggindi

Visti tú, at samstundis sum tú nemur tær skjóta og lætta vitan, er vandi fyri, at tú lærir minni og klárar teg verri til próvtøkurnar, um tú bara brúkar vitlíki? Visti tú, at úti í samfelagnum er stórur eftirspurningur eftir fólki, sum duga at arbeiða sjálvstøðugt og hugsa kritiskt? At hugsa kritiskt og at arbeiða sjálvstøðugt krevur venjing.

Tá tú skalt læra okkurt nýtt, er eingin vegur uttanum: Tað tekur tíð. Evnið, tú ert í holtur við at læra, setur seg fastari, tá tú dvølur við tað eina løtu, heldur enn at fáa eitt maskinskrivað svar upp á 5 sekund við einari lidnari loysn. Veitst tú einki um evnið frammanundan, hevur tú ongan møguleika at fyrihalda teg kritiskt til svarið.

Tí er viðhvørt eisini neyðugt at duga at velja vitlíki frá. Vitlíki nýtt við fyrivarni kann vera hent til at skapa ein bygnað, skjótt fáa endurskoðað høvuðstættirnar í einum teksti ella virka sum leiðbeinari, tá tú skalt rokna eina uppgávu. Men letur tú vitlíki gera alt arbeiðið fyri teg, velur tú arbeiðsgongdina, og harvið eisini læringina, frá. Tað svarar til, at tú fert í eina venjingarmiðstøð og biður venjaran lyfta vektirnar fyri teg. Arbeiðið verður gjørt, men tú verður ikki sterkari.

Vitlíki sparir okkum tíð, men vit mugu eisini hava tíð og tol at stara út í tóman heim og hugsa. Tað er júst í slíkum løtum, at heilin fer til arbeiðis. Har tú endurskoðar, hugsar, kjakast, greinar og tulkar. Alt tað, sum vit støðugt venja gjøgnum árið, og sum tú skalt duga til próvtøkuna.

Tað er tann gongdin, sum mennir tín førleika at hugsa sjálvstøðugt og kritiskt.



Rannvá Mortansdóttir undirvísir í lærugreinunum enskt, føroyskt og miðlakunnleika á Glasi



# Glasir hevur nógvar tænastur at bjóða

## Lestrarvegleiðingin - ein hurð

Fyri at lætta um hjá tær er ein hurð at fara til, har allur stuðul verður samskipaður. Ein lestrarvegleiðari er knýttur at hvørjum flokki og fylgir tær gjøgnum alt skúlaskeiðið. Hevur tú brúk fyri stuðli, hjálp og vegleiðing til umstøður, ið ávirka skúlagongdina, kanst tú fara til lestrarvegleiðaran.

Sum næmingur kanst tú trygt og í trúnaði venda tær til tín lestrarvegleiðara við øllum viðurskiftum m.a. persónlig, sosial, fíggjarlig og faklig viðurskifti.

## Bókasavnið

Bókasavnið er eitt skattkamar av íblástri, ein skapandi snúningsdepil, har tú kanst hugsavna teg, gera verkætlanir og samstarva við aðrar næmingar.

## Lesi- og skrivivegleiðing

Hevur tú avbjóðingar við at lesa og/ella skriva, kann Lesi- og skrivitænastan geva tær amboð og vegleiðing, sum kann lætta um tína skúlagongd.

## Lektiukafé

- Hjálp frá lærarum og næmingum
- Ókeypis mat og drekka
- Hugnaligar umstøður, gott huglag
- Møguleiki at hitta aðrar næmingar

**“Man fær fantastiska góða hjálp og ein góðan drekkamunn”**

**“Tá ið man fer frá 02 í fólkaskúlanum til 12 á C-stigi, so veit man, at lektiukaféin ger mun”**

**“Nú er støddfrøði mítt yndisfak”**

# Nógv tiltøk á Glasi

Á hvørjum ári eru fleiri tiltøk á Glasi. Í 2025-2026 høvdu vit vitjan av dansibólkinum Land Before Time, sum framførdi dansisýningina Waterkind í Atrium á Glasi. Eisini vitjaði Vónbjørt Vang, ið vann Virðisløn Norðurlandaráðsins fyri yrkingasavnið Svørt Orkidé.











# Vit fara væl um skúlan




Vit leggja stóran dent á at fara væl um okkara skúla. Tí virða vit okkara skilhaldsreglur, so tað er hugaligt hjá øllum at vera á Glasi.

Matur og borðbúnaður hoyrir bert heima í kantinuni. Tað er ikki loyvt at taka mat við sær út úr kantinuøkinum. Vit rudda alt burtur eftir máltíðir.

Eftir hvønn tíma rudda vit skúlastovurnar. Vit seta stólar upp á pláss og koyra burturkast í ruskspannina eftir hvønn tíma.

Hetta er sett í gildi fyri at geva øllum góðar umstøður at virka undir og fyri at áseta mannagongdir fyri skilagóða atferð.

Haraftrat, so lýsa reglurnar mannagongdir skúlans og skyldurnar hjá næmingum og lærlingum við uppmøting, innlating og skilhaldi sum heild.

Allir næmingar og lærlingar hava skyldu til at seta seg inn í hesar reglur og fylgja teimum. Les meira á glasir.fo/skilhald ella á hesum QR-leinki:

GLASIR

TÓRSHAVN COLLEGE